# Roykur men einki bál



*Stjørnuformaðurin harmast støðuna, men hann tykist staðfesta, at dysturin verður spældur. Eisini hóast venjarin hjá Stjørnuni heldur tað einasta rætta verður, um Stjørnan verður dømd at vinna dystin 0-0*

## Hondbóltsstøður

SUNSET KAPPINGIN – KVINNUR

| | dystir | v - j - t | v. mál | t. mál | mál.- munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 7 | 6 - 0 - 1 | 214 | 142 | 72 | 12 |
| 2 Stjørnan | 5 | 5 - 0 - 0 | 138 | 104 | 34 | 10 |
| 3 Neistin | 6 | 4 - 0 - 2 | 177 | 132 | 45 | 8 |
| 4 Søljan | 6 | 4 - 0 - 2 | 178 | 138 | 40 | 8 |
| 5 VÍF | 7 | 3 - 0 - 4 | 162 | 175 | -13 | 6 |
| 6 StÍF | 7 | 1 - 1 - 5 | 150 | 186 | -36 | 3 |
| 7 Kyndil | 5 | 0 - 1 - 4 | 92 | 146 | -54 | 1 |
| 8 Tjaldur | 5 | 0 - 0 - 5 | 98 | 186 | -88 | 0 |

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN – MENN

| | dystir | v - j - t | v. mál | t. mál | mál.- munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 7 | 6 - 0 - 1 | 200 | 172 | 28 | 12 |
| 2 Kyndil | 6 | 4 - 0 - 2 | 179 | 145 | 34 | 8 |
| 3 H71 | 7 | 4 - 0 - 3 | 216 | 201 | 15 | 8 |
| 4 KÍF | 7 | 3 - 0 - 4 | 179 | 204 | -25 | 6 |
| 5 Neistin | 6 | 2 - 0 - 4 | 174 | 178 | -4 | 4 |
| 6 StÍF | 7 | 1 - 0 - 6 | 182 | 230 | -48 | 2 |

## Máltindarnir

**Kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| Ioana Rápa | VÍF | 75 (22) |
| Nicoleta Radu Hansen | Søljan | 66 (8) |
| Daiva Tuomaite | VB | 66 (27) |
| Simona Petersen | Neistin | 52 (13) |
| Aukse Vysniaskaite | VB | 47 (1) |
| Rebekka Justinussen | StÍF | 38 (8) |
| Vesna Tomajek | Tjaldur | 38 (18) |
| Lina Andriulyte | Søljan | 35 (2) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 35 (10) |
| Marjun Tróndarson | Neistin | 33 (2) |
| Alina Olaru | Stjørnan | 33 (4) |
| Poula D. Olsen | StÍF | 32 |
| Sunfríð B. Jacobsen | StÍF | 30 (13) |
| Ása Dam á Neystabø | Neistin | 29 (2) |
| Rannvá Augustinussen | VB | 28 |

**Menn**

| | | |
|---|---|---|
| Ingi Olsen | VÍF | 53 (15) |
| Henrik Gerster | H71 | 46 (4) |
| Áki Mørk | Neistin | 45 (7) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 44 (2) |
| Agnar Joensen | VÍF | 43 (2) |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 42 (7) |
| Piti Negru | H71 | 39 (2) |
| Damir Oros | Neistin | 37 (9) |
| Josef Abrahamsen | Kyndil | 31 (8) |
| Leivur Justinussen | StÍF | 29 (4) |
| Blagoje Buha | Neistin | 27 (1) |
| Høgni Klein | Kyndil | 26 (1) |
| Regin Petersen | KÍF | 26 (3) |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 26 (4) |
| Jacob Jónsson | Kyndil | 24 |

**Hóast summi lova bæði bál og brand, so tykist alt málið um dystin millum Stjørnuna og Kyndil at fáa ein friðarligan enda, har liðini fáa avgreitt dystin á vøllinum**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sunnudagin varð staðfest, at Stjørnan enn einaferð mátti lata sær lynda, at tær ikki fingu avgreitt heimadyst. Tað merkir, at liðið ikki hevur verið í dysti, síðani tær tann 2. november leiktu útidyst móti StÍF. Sjálvandi ikki ein støða, sum er nøktandi í longdini. Og sunnukvøldið hoyrdist eisini tos um, at hetta mátti fáa avleiðingar fyri Kyndil, ið hesaferð var liðið, sum ikki møtti upp.

Ikki minst varð hetta sagt, tí Stjørnan hevðiu riggað ymiskt til í sambandi við dystin. Joan M. Joensen varð keypt heim úr Danmark. Og eisini var køkutombola riggað til í høllini. Tær køkurnar mundu so fyri tað mesta fella aftur til leikararnar og mammurnar, sum høvdu bakað tær.

### Tekur tað róligt

Venjarin hjá Kyndli, Geir Wardum, tók tó alt hetta ógvuliga róligt, tá vit høvdu orðið á hann sunnukvøldið.

– Fyrst og fremst, so hevur Stjørnan alla tíðina verið kunnað um, at vit komu ikki norður at spæla sunnukvøldið. Upprunaliga varð dysturin ásettur seinasta vikuskiftið, men tá hevði KÍ eitt rimmar ball, og tí var høllin ikki tøk.

– Tá játtaðu vit, at dysturin bleiv fluttur, men hann varð settur á skránna nú sunnudagn, uttan at vit yvir høvur vórðu eftirspurd. Hetta var einasta frívikuskiftið, sum leikarar okkara høvdu, og fleiri høvdu eisini lagt sær ymiskt til rættist hareftir.

– Soleiðis hevði tað verið við einum sera skerdum liði, at vit fóru til Klaksvíkar, um vit høvdu farið. Eitt nú fekk málverjin ikki verið við júst sunnudagin. Og tað sigur seg sjálvt, at tað ikki er nøkur optimal støða. Hesum havi eg eisini boðað bæði Stjørnuni og HSF frá í teldubrævi, so hví tey skulu fáa leikarar av bygd til Klaksvíkar, og eisini fáa Joan M. Joensen heim úr Danmark, veit eg ikki, staðfestir Geir Wardum.

Og hann leggur eisini dent á, at Kyndil fegin vil hava dystin avgreiddan.

– Tað einasta, sum vit hava sagt, er at vit ikki fingu spælt sunnudagin. Vit spurdu okkum enntá fyri hjá Stjørnuni, um at spæla dystin antin fríggja- ella leygardagin, men tað varð blankt avvíst.

– Nú vóna vit so bara, at tað fer at bera til at spæla dystin. Tað skal so ikki vera nakar ivi um, at tað er tað, sum vit vilja. Ikki minst hevði eg sjálvur glett meg til dystin. Eg havi búð í Klaksík í 10 ár, og havi eisini vant Stjørnuna, so eg havi glett meg til at uppliva stemningin í høllini, sigur Geir Wardum at enda.

### Ymsar áskoðanir

Starvsfelagi hansara í Stjørnuni, Rógvi Nielsen, tykist tó ikki geva nógv fyri prátið hjá Kyndilsvenjaranum.

– Geir skal bara vita, at tað eru hvørki hann ella vit, sum flyta dystirnar. Tað er kappingarnevndin, sum ger av, nær dystirnir eru spældir, og er hann ásettur til sunnudag, so skal hann spælast sunnudag. Reglurnar eru sera greiðar á økinum, og kappingarnevndin má so handla hareftir, sigur Rógvi Nielsen.

– Tað nyttar ikki, at feløgini nú koma afturum, soleiðis at dystirnir hjá okkum móti ávíkavist Tjaldri og Kyndli verða avgjørdir, við at vit vinna 0-0. Tað er sjálvandi keðiligt fyri málmunin hjá okkum, men soleiðis má tað verða.

Formaðurin í Stjørnuni, Kristoffur Ragnarsson, er tó ikki heilt so avgjørdur.

– Læt meg bara tað soleiðis, at mær dámar øgiliga illa, tá dystir verða vunnir á pappírinum. Og tað rakar okkum eisini hart, at vit ikki hava spælt dyst í tríggjar vikur. Tí vóni eg, at vit onkursvegna fáa avgreitt hetta, soleiðis at dysturin hóast alt verður spældur, heldur hann.

– Hinvegin, so vóru tað ikki vit, sum flutt dystin. KÍ boðaði HSF frá, at høllin ikki var tøk, og tí varð dysturin fluttur. Sjálvandi skilji eg partvíst støðuna hjá Kyndli, men tað líkist altso ongum, at dystir alla tíðina verða fluttir aftur og fram. Tað er ein trupulleiki, sum má loysast, staðfestir formaðurin í Stjørnuni at enda.

JAVNI

## Hvussu stórur er tørvurin á bústøðum til fólk við menningartarni?

Til tess at lýsa veruliga tørvin og styrkja kravið um bústaðir til mennigartarnað fólk mótvegis okkara myndugleikum, hevur tað stóran týdning fyri Javna, at tey, sum hava, ella meta seg fáa tørv á bústaði fimm tey næstu árini, boða okkum skrivliga frá hesum skjótast til ber.

Javni hevur tørv á hesum upplýsingum:

1. Nær bústaður ynskist.
2. Hvar bústaður ynskist.
3. Slag av bústaði.
4. Aldur og kyn á viðkomandi.
5. Um viðkomandi hevur arbeiði.

Adressan er:
javni@javni.fo

**JAVNI**
Hoydalsvegur 40, 3. hædd
Postboks 1133
FO - 110 Tórshavn

ØGGUSTOVAN OG BARNAGARÐURIN Á KONMANSMÝRU

## Pedagogar

**Vit søkja eftir 2 pedagogum.**
Søkt verður eftir einum pedagogi 30/35 tímar um vikuna, at byrja 3. januar 2005 og einum pedagogi 35 tímar um vikuna frá 1. mars 2005 ella eftir nærri avtalu.
Á stovunum eru 17 børn í aldrinum 3-5 ár.

Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur. Børnini eru í aldrinum 3-7 ár.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
• Hevur góð samstarvsevni
• Er røkin, nærlagdur og álítandi
• Nýhugsandi og ígongdsetandi

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Lønarstig, 9

Meiri fæst at vita við at ringja til okkum og tosa við leiðaran. **Tlf. 317878.**

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmæli skal vera okkum í hendi seinast 15. desember 2004.

**Barnagarðurin á Konmansmýru**



## Aðalfundur

Boðað verður til aðalfund hjá Vága Ríðingarfelag tann 03.12.2004 kl. 19.00 í SÍ-húsinum.
Møtið fjølment.

**Nevndin**

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

## Termodrakt

- Draktin til byggimeistarar, entreprenørar og sjómenn
- Luksus termodrakt.
- Bláar og svartar við endurskini

TILBOÐSPRÍSUR
**598,-**



Sosialurin 341800



## KIA CARNIVAL
**2.9 LS TDI 7 pers.**

Árg. februar 2001, Km 39.000. Bilurin hevur turbodiesel motor, trekkir sera væl, er ljóst brúnur og tekur 7 persónar, hevur stórt og høgt bagagurúm og er sera væl egnaður sum familjubilur. JVC-discspælari við radio og 4 eyka píkadekk við góðum felgum fylgja eisini við í keypinum.

**Prísuppskot: kr. 160.000,-**

Tel. 57 36 88 ella 22 57 63
T-post: sapo@post.olivant.fo

NÓSA CUP 2004

## Nósa Cup 2004 verður í høllini í Trongisvági 4. desembur

**Tilmelding á tlf. 372539 áðrenn 30/11-2004**

Liðini kunnu hava nøvn: TB, Flamingo, Man. United e.l. 5+1 leikarar kunnu vera á hvørjum liði, uttan hjá unglingunum, ið kunnu hava 4+1. Nr. 1, 2 og 3 fáa heiðursmerki frá Nósa.



| | |
|---|---|
| Minipiltar | 1997- |
| Smápiltar | 1995-96 |
| Piltar | 1993-94 |
| Smádreingir | 1992-91 |
| Dreingir | 1990-89 |
| Unglingar | 1988-86 |
| Gentur | 1995-96 |
| Gentur | 1994-93 |
| Gentur | 1992-91 |
| Gentur | 1990-89 |
| Gentur | 1988-87 |

Luttakaragjald kr. 200 fyri liðið

Frætt um Nósa og Nósa-konto á www.nosi.fo

FØROYA BANKI

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!